SKEIÐ

## Fuktur í bygningum

Í døgunum 28. – 29. mai skipar Landsverk saman við donsku fyritøkuni Byggecentrum fyri skeiðnum „Fugt i bygninger" á Hotel Hafnia í Havn. 28. mai er skeiðið frá kl. 8.30 – 17.30, og 29. mai frá kl. 8.30 – 15.00.

Skeiðið vendir sær í høvuðsheitum til fólk í byggivinnuni og til teirra, ið varða av bygningum. Luttakaratalið er avmarkað.

**Tekning**
Boðast skal frá luttøku á sj@lv.fo í seinasta lagi 24. apríl 2008. Vinarliga upplýsið arbeiðspláss, navn og starvsheiti.

**Kostnaður**
Skeiðið kostar kr. 6.000. Íroknað gjaldið er skeiðstilfar og matur. Gisting er ikki íroknað. Luttakararnir fáa skeiðstilfarið á geyma. Peningurin skal flytast á kontu nr. 9181-128.220.6 í Eik Banka í seinasta lagi 24. apríl 2008. Vinarliga viðmerkið „Byggecentrum skeið".

Avboð skal gevast skrivliga í seinasta lagi tvær vikur áðrenn skeiðsbyrjan. Verður avboð givið seinni, verða 50% at gjalda av kostnaðinum.

Skeiðið er stytt nakað í mun til donsku útgávuna, sum til ber at lesa um á heimasíðuni www.bygnet.dk - Kurser & Konferencer.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*



## Farmakonomnæmingur til Suðuroyar Apotek

Suðuroyar Apotek bjóðar næmingapláss til ein næming at byrja 1. juni.

Ert tú sjálvstøðug/ur og ábyrgdarfull/ur?
Er tú áhugað/ur í, at læra um heilsu, heilivág og handfaring av heilivági?
Dámar tær at arbeiða við KT ?
Dámar tær at arbeiða í toymi og at hava við fólk at gera?

Hevur hetta tín áhuga, er eitt lærupláss sum farmakonomnæmingur á Suðuroyar apoteki at byrja 1. juni 2008, leyst at søkja.

Um útbúgvingina:
Tú lærir í 3 ár. Útbúgvingin skiftir ímillum arbeiði á apotekinum og skeið á farmkonomskúlanum í Hillerød - Danmark

Krøv til umsøkjaran: Students-, HF-, HH-, HT- ella Fiskivinnuskúlaprógv.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal sendast áðrenn 15. mai til:

SUÐUROYAR APOTEK
Undir Heygnum 4
800 Tvøroyri
tlf. 371076

www.apotek.fo

# Skrivstovufólk/Starvsfólk

## Av tí at øktar uppgávur eru á útbreiðsludeildini, er eitt áhugavert starv hjá okkum leyst at søkja

**Høvuðsuppgávur:**

- Haldaratænastan
- Samskifti við starvsfólkið kring landið
- Postgreiðsla/Telefongreiðsla
- Vanligt skrivstovuhald

## Førleikakrøv:

**Vit vænta, at tú hevur viðkomandi royndir:**

- Skrivstovukunnleika
- Kunnleika í nýtslu av teldu
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
- Koyrikort

– og dugir at arbeiða í einum umhvørvi, har úrslit, tænasta og deadline eru lyklaorð.

Setanar- og lønartreytir verða sambært avtalu, og starvið verður at seta skjótast til ber. Tó bíða vit fegin eftir rætta viðkomandi.

## Umsókn:

**Umsókn við prógvum o.ø. skal sendast til:**
Prentmiðstøðin
Mrk.: Umsókn
Postboks 3314
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 28. apríl 2008.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til
Hallstein Sigurðsson, samskipara, á telefon 564600

P/F Prentmiðstøðin varð stovnað á sumri 2000, tá Dimmalætting og Sosialurin løgdu blaðprentsmiðjur sínar saman. Endamál felagsins er at prenta bløð umframt at bera bløð út.
Í løtuni prentar felagið tey flestu bløðini, sum koma út í Føroyum, og stendur harafturat fyri flutningi og útbering av Dimmalætting og Sosialinum fimm ferðir um vikuna. Vit bera eisini reklamur til hvørt húsarhald .

**Prentmiðstøðin**

# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA

